Vikuskiftis
Sosialurin

Nr. 70 • Vikuskiftið 7.–12. apríl 2006 • 80. árgangur • Kr. 15,00

www.sosialurin.fo




# Barskor seld fyri eina krónu

**Hugflogið millum tingmenn var stórt, tá ið teir í sambandi við eykajáttanarlóg viðgjørdu ætlanina hjá landsstýrinum at geva 80 ára gamla strandferðsluskipið til Íslands**

SKIPASØLA



*Íslendingar, sum fyri 80 árum síðani bygdu Barskor, fáa eftir ætlan skipið aftur fyri eina krónur*

Barsskor er farin í søguna sum strandferðsluskip. 80 ára gamli báturin, sum røkti siglingina millum Klaksvík og Kalsoy, liggur framvegis í Klaksvík. Men har verður báturin ikki at síggja leingi afturat, um tað verður, sum landsstýrið ætlar.

Barsskor varð bygd í Akranesi í Íslandi, og nú eru íslendingarnir, sum bygdu, áhugaðir í at fáa bátin aftur. Hetta er mál, sum longu var á skránni, tá ið Anfinn Kallsberg var løgmaður og var á almennari vitjan í Íslandi.

Onkrir tingmenn vóru ikki so fegnir um, at Barsskor skal til Íslands. Boð er komið úr Føroyum upp á einar 70 túsund krónur. Á tingfundinum fyrrapartin í dag vóru tað onkrir, sum talaðu fyri at føroyingar varðveita skipið í Føroyum.

Aðrir vóru avgjørt fyri, at skipið verður latið íslendingum. Teir mettu, at orðaskiftið var óvirðiligt fyri gávuna, sum skal sendast til Íslands.

– Eg havi verið borgarstjóri í Klaksvík í sekstan ár. Eg kenni nógv dømi um gomul skip og bátar, sum vórðu løgd við bryggju í Klaksvík við tí ætlan, at tey skuldu setast í stand. Endin var ofta, at havnamyndugleikarnir noyddust at taka sær av sovornum bátum, segði Jógvan við Keldu.

Kári P. Højgaard segði seg eisini vera sera áhugaðan fyri, at báturin skal fara til Íslands, og hann bjóðaði sær til at føra bátin til Íslands. Henrik Old hevði frammanundan bjóðað seg fram at syrgja fyri hesum.

Tingmenn sveimaðu víða. Spurningurin varð eisini havdur á lofti, um tað ikki hevði verið gott hugskot at sett Dúgvuna upp á land og nýtt hana sum konserthøll í Klaksvík.

Eykajáttanarlógin varð beind til viðgerðar í fíggjarnevndini. Tingfundurin varð niðurlagdur kl. 12.30. Hann varð uppafturtikin kl. 13.30. Tá vóru eitt nú útbygging av tekniska skúla í Klaksvík og skúladepli í Marknagili á skránni. *Lesið meira á síðu 49*



FM finala í hondbólti:
## Risarnir berjast um gullið
Ítróttur 17



## Mr. Supertramp á Summarfestival
Síða 8




Eli Smith við rullandi atelieri:
## Til Spania at granska holumálningar
Síða 25



Krasnik í Miðlahúsinum:
## Undir húðina á Islam
Síða 27













